FYLGISKJAL 2

almannaverkið

| | |
|---|---|
| Almannamálaráðið<br>Eirargarður 2<br>100 Tórshavn<br><br>Att.: Poula Árnadóttir Lervig, fulltrúi | **Tórshavn, tann:** 21. oktober 2019<br><br>**J.nr.:** 610.K04-0034/19<br>(at tilskila í svari)<br><br>**Tygara skriv.:** 19/00269<br><br>**Viðgjørt:** Birgit Vitalis Ottosen |

**Hoyringsviðmerkingar til broyting í løgtingslóg um almannapensjónir o.a.**

Almannamálaráðið hevur við telduposti tann 8. oktober 2019 sent Almannaverkinum omanfyri nevnda lógaruppskot til hoyringar.

Almannaverkið hevur hesar viðmerkingar til uppskotið.

Mett verður, at rættarstøðan hjá teimum fyritíðarpensjónistum, sum hava fingið tillutað pensjón áðrenn 1. januar 2003, og flyta til Danmarkar við pensjón, eigur at verða lógarfest í sambandi við ger av lóggávu um rættarstøðuna hjá fyritíðarpensjónistum, sum flyta millum ríkispartarnar, eftir at hava fingið tillutað fyritíðarpensjón eftir 1. januar 2003. Í donsku kunngerðini um "højeste, mellemste, forhøjet almindelig og almindelig førtidspension v.m." eru ásetingar um flytan úr Føroyum til Danmarkar við fyritíðarpensjón, sum er játtað ella har málið er byrja áðrenn 1. januar 2003. Ongar ásetingar eru í almannapensjónslógini um hetta, men hevur Almannaverkið higartil viðgjørt hesi mál sambært einum skrivi frá Almannamálaráðnum, dagfest 14. november 2003, umframt út frá einari analogari tulking av donsku ásetingunum.

Í uppskotinum um broytingar í donsku kunngerðunum um "social pension (førtidspension og folkepension)" og um "højeste, mellemste, forhøjet almindelig og almindelig førtidspension m.v." eru m.a. ásetingar um

- hvørji skjøl og upplýsingar eru neyðug fyri at viðgera eina umbøn um flytan úr Føroyum/Grønlandi til Danmarkar við fyritíðarpensjón
- tíðarfreist uppá 1 mánað fyri nær Danmark eftir áheitan úr Føroyum/Grønlandi skal hava sent neyðugt skjøl í málinum
- nær fyritíðarpensjón verður veitt frá, og útgjald av eftirgjaldi. At fyritíðarpensjón verður játtað afturvirkandi frá tí, at fyritíðarpensjónisturin er fluttur til Danmarkar, og at fyritíðarpensjón sum er útgoldin úr Føroyum fyri eftirgjaldstíðarskeiðið verður mótroknað, áðrenn social pensjón verður útgoldin. Vísandi til orðingina í § 3 d í føroyska lógaruppskotinum, so skal viðkomandi rinda fyritíðarpensjónina fyri hetta tíðarskeiðið aftur, samstundis sum hon verður mótroknað í Danmark. Ásetingarnar í § 58 í uppskotinum um broyting í kunngerð um "social pension" og § 3 d í lógaruppskotinum um broyting í almannapensjónslógini eru sostatt ikki í samsvar við hvørja aðra. Viðmerkjast kann, at pensjónisturin er skattskyldugur í

Staravegur 18 • Postboks 3096 • FO-110 Tórshavn • Tel 360000 • Faks 360001 • av@av.fo • www.av.fo

Danmark hetta tíðarskeiðið, og viðførir eitt krav um afturgjald av føroysku pensjónini, at pensjónisturin má venda sær til SKAT um at fáa lækka skattskyldugu inntøkuna fyri tíðarskeiðið. Donsku skattareglurnar um uppafturtøku av álíkningini eru tá galdandi.

Mælt verður til, at omanfyri nevndu viðurskifti verða nágreinað í uppskotinum um broyting í almannapensjónslógini. Eisini eigur støða at verða tikin til, um karensreglurnar í § 32 í almannapensjónslógini eru galdandi, ella um neyðugt er at áseta serligar reglur hesum viðvíkjandi fyri flytan til Føroyar við fyritíðarpensjón.

Til gildiskomuna
Sambært gildiskomuni er lógin ikki galdandi fyri fyritíðarpensjónistar, ið hava fingið tilluta lægstu og miðal fyritíðarpensjón, og sum eru fluttir til Danmarkar/Grønlands eftir 3 ára regluni í § 3, stk. 4 í almannapensjónslógini. Tað framgongur ikki greitt, um hesir fyritíðarpensjónistar kunnu velja at fara yvir á nýggju skipanina, t.d. tá teir hava verið 2½ ár í Danmark, og tá fáa 1 ár afturat teimum 2½ árunum. Koma hesir fyritíðarpensjónistar sjálvvirkandi undir 12 mánaðar regluna, um teir ikki hava fingið uppihaldsgrundarlag eftir donsku lóggávuni, tá tey 3 árini eru farin, ella mugu/kunnu teir flyta aftur til Føroyar, og so flyta til Danmarkar aftur eftir nýggju 1 ára ásetingini?

Flyta persónar við hægstu fyritíðarpensjón, sum eru fluttir eftir 3 ára regluni yvir á nýggju skipanina, tá lógin kemur í gildi? Mælt verður til greitt at áseta, nær hesir flyta yvir í nýggju skipanina.

Í almennu viðmerkingunum undir pkt. 1.2 Endamálið við uppskotinum stendur:
"Hetta verður gjørt við at javnseta teir fyritíðarpensjónistar, ið flyta millum Føroyar, Danmark og Grønland, við fyritíðarpensjónistar, ið flyta millum Føroyar og onnur norðurlond". Til hetta skal viðmerkjast, at fyritíðarpensjónistar ið flyta millum Føroyar og onnur norðurlond fáa eina brøkpensjón úr Føroyum í mun til bústaðartíðina her. Tað norðurlandið, sum viðkomandi flytir til ella hevur verið búsitandi í, tekur sjálvstøðugt avgerð um viðkomandi lýkur treytirnar, herundir heilsuligt treytirnar, fyri at fáa eina pensjón (brøk) úr landinum.

"Hervið verða nýggir fyritíðarpensjónistar javnsettir við tey, ið fingu fyritíðarpensjón áðrenn 1. januar 2003". Hetta er einans galdandi fyri fyritíðarpensjónistar, sum fáa hægstu fyritíðarpensjón, og sum hava fingið játtað fyritíðarpensjón áðrenn 1. juli 2018, tí tað eru hesir, sum fara sjálvvirkandi yvir á danska fyritíðarpensjón við somu innvinnan av bústaðartíð, sum omanfyri nevndu fyritíðarpensjónistar. Fyri fyritíðarpensjónistar, ið fáa lægstu ella miðal fyritíðarpensjón er ikki talan um eina sjálvvirkandi skipan, eins og teir, sum eru eftir gomlu skipanini. Harumframt er innvinnan av bústaðartíð broytt fyri allar pensjónistar, har mál um pensjón er reist 1. juli 2018 ella seinni.

Niðast undir pkt. 1.3. stendur, at gjørd verður skiftisregla "fyri teir føroyingar, ið longu hava búð í Danmark ella Grønlandi longur enn 12 mánaðir..." Hví verða 12 mánaðir nevndir, tá skiftisreglan einans nevnir fyritíðarpensjónistar, sum eru farnir eftir 3 ára regluni, uttan at áseta hvussu leingi hesir hava verið í Danmark/Grønlandi?

Vinaliga

Birgit Vitalis Ottosen

Birgit Vitalis Ottosen
ráðgevi

Staravegur 18 • Postboks 3096 • FO-110 Tórshavn • Tel 360000 • Faks 360001 • av@av.fo • www.av.fo